

*Dánjal stendur her við grøvina hjá mammubeiggja sínum, Daniel Viderø, ið hann er uppkallaður eftir*
*Mynd: Høgni Thomsen*

# Helvtin av monnunum itu Jógvan

**- At gera allar hesar gravsteinarnar er ikki løtuverk. Tað næsta eg má gera er at fara niðan í Malinsfjall eftir meiri gróti, sigur Dánjal.**

**GRAVIR**
*Snorri Brend*

Til hetta stóra arbeiðið hjá Dánjali krevjast sjálvandi gravsteinar. Hesar tørvar honum ikki at fara av bygdini eftir.

Í Malinsfjalli, sunnanfyri bygdina, er hópurin av steinum. Men vakna eygað hjá Dánjali er kortini bert áhugað í nøkrum fáum teirra, tí teir skulu lúka ávísar treytir:

Teir skulu vera mannbarir, og haraftrat skal tann eina síðan vera somikið sløtt, at ein pláta kann festast á.

Haraftrat hevur hann lagt dent á, at steinarnir skulu hava ymisk mosasløg á - hvítan og tann vanliga.

Tað er sum hann sigur tað: - Tá sær tað eitt sindur penari út!

Eftir at steinarnir eru fingnir til hús, verða teir vaskaðir við serstøkum evni, áðrenn plátan við navninum verður fest á, bæði við cikaflexi og skrúvum, soleiðis at vatn ikki sleppur undir.

## Koma í bland

Pláturnar eru úr plastikki, soleiðis at tær ikki skulu rusta ella farast so lætt. Áður varð kopar brúkt til slíkt, men tað komst av at ein ikki fekk annað tilfar.

Á plátunum stendur ikki bert navnið og árstalið fyri føðing og deyða skrivað á. Her er somuleiðis skrivað á, hvussu fólkini vóru nevnd millum manna.

– Í eini lítlari bygd er ein slíkur upplýsingur sera týdningarmikil. Tí, sært tú, - helvtin av monnunum kallaðust Jógvan, men eftirnavn visti ein ikki hvat ið var.

– Tí legði ein altíð eitt "hjá" aftrat ella eitt "úr", fyri at vísa úr hvørjum húsi hann var, sigur Dánjal og vísir til navnið Jákup á Miðlaðnum.

Hesin maðurin bar navn sítt av teirri einfaldu orsøk, at hann búði har. Á Viðareiði hevur ein nøvnini "uppi á Laði" og "úti á Laði" og altso eisini á Miðlaði, hagani hesin Jákup var ættaður.

Hesin sami Jákup á Miðlaðnum varð eisini nevndur "Roykstovu-Jákup". Hetta komst av, at tað í veruleikanum vóru tveir mans við navninum Jákup í sama húsi og sum haraftrat vóru í familju.

– Fyri at skilja millum hesar báðar, kallaðu teir hin fyri Kamars-Jákup, tí hann búði í einum øðrum rúmi í húsinum og sum varð nevnt ´"á Kamarinum".

– Tað var tí altíð eitt endamál við hesum nøvnunum. Um ikki, so hevði alt bara komið í bland.

– Og hetta vóru tí heldur ikki nøvn, sum ein himpraðist við at siga, slær hann fast.

Δ

**Tað er latið mær fortalt, at tá teir slógu kirkjugarðin tóku teir pelarnar upp. Og so er ein spurningur, um teir altíð vórðu settir niður aftur á rætta stað**

ikki áhugan fyri gravunum, tí tað var vanligt at vitja gravirnar, tá gudstænastan var liðug.

Í dag hevur Dánjal fult yvirlit yvir tann eystara kirkjugarðin, men honum vantar at leggja 30 steinar í tann vestara garðin við fólki, sum hann hevur kunnað peilað seg inn á.

Hetta arbeiðið er kortini ikki so lætt, tí at grivið er í hóp oman yvir hvørt annað.

Δ

**Um onkur hevði flutt steinarnar burtur, hevði eg lættliga kunnað sett teir upp á pláss aftur**



*Eitt stórt arbeiði er lagt í ætlanina: At kanna hvør lá hvar og síðani at útvega bæði gravsteinar og plátur við nøvnunum á*
*Mynd: Høgni Thomsen*